# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*Mammudagin 8. mai fingu Óluva Maria Bech og Jóhann Simonsen eina dóttur. Erla, Selma og Eva Maria fingu við hesum eina lítlasystur, sum vigar 5000 gr og er 56 cm long.*



*11. mai fingu Jonna og Otniel Nygaard, Trongisvági, ein son á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Hann vigaði 4000 gr og og var 54 cm langur. Tey fara at nevna hann Julian.*

27. apríl fingu Jónrid og Søren Halling, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

1. mai fingu Marit Hansen, Tvøroyri, og Eirik Joensen, Sumba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

4. mai fingu Herborg J. í Homrum og Bogi Joensen, Skála, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2975 gr.

5. mai fingu Barbara Poulsen og Hans Edvard Sigurðsson, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4050 gr.

5. mai fingu Rúna Poulsen og Guttormur í Skála, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3400 gr.

6. mai fingu Hjørdis Zachariassen og Harald Bjørgvin, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

7. mai fingu Marit H. Jensen og Friðfinn Nicolajsen, Skopun, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

8. mai fingu Eva úr Dímun og Jógvan Jón Petersen, Dímun, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3950 gr.

9. mai fingu Sigrid og Joen Peter Petersen, Skálavík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3400 gr.

9. mai fingu Bjarta og Trúgvi Petersen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3350 gr.

10. mai fingu Ingun og Heri Davidsen, Runavík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2850 gr.

12. mai fingu Harda Jacobsen og Tórur Andreasen, Strondum, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4400 gr.

# Niels Persson til minnis

Ikki vardi tað okkum, at tað skuldi vera síðstu ferð vit sóust, tá mamma ringdi og segði at babba varð vorðin illa fyri og bað okkum fáa sjúkrabil at koma eftir honum.

Klokkan gott eitt somu nátt var babba farin.

Sama dag hevði babba verið á Landssjúkrahúsinum til kanningar, men læknarnir staðfestu bara, at tað var lungnabruni, ið bagdi, men so var ikki.

Babba var borin í heim 7. juni 1938 í Havn og var hann miðlingur av trimum syskjum, nú er bert eitt teirra eftir her á fold.

Petur Mohr og Elisabeth Persson, fødd Johansen, vóru foreldur hansara, og uppvøksturin hjá babba var í Gundadali, har abbi og omma áttu jørð.

Babba og mamma giftust tann 23. apríl í 1962, og var stórt gildi í Gundadali. Tá vóru bert eini fimm hús í dalinum, og ofta hava teir, ið skuldi bjóða okkurt gott undir góman, flent at tí stóra areali, ið rennast skuldi, fyri at gera øllum til vildar. Nú er nærum bygt á hvørjum fermetri.

Babba var sera góður við mammu. Ofta hava vit fingið at vita, at hetta var fyrimyndin av hjúnalagi. Babba var vorin heilt »býttur« í hesu fittu skopunargentu, ið hann fekk kosið sær á ungum árum.

Eftir lokna skúlagongd fór babba í læru sum el-innleggjari hjá Sigird av Reyni, og treivst hann sera væl.

Minnast væl, tá hann segði frá, at um lærlingarnir vóru seint úti á kvøldi, kom Sigird ofta og bað teir fara til songar, hetta fyri at kunna útinna dagsins verk dagin eftir.

Kann siga at hetta var eisini babbasa »motto«, tá hann seinni bleiv arbeiðsgevari.

Eftir lokna útbúgving stóð hugurin til bilar, og mong kenna babba frá rutukoyring millum bygdir, bæði í Streymoynni og ikki minst í Norðstreymoy, har rutukoyringin fyrst var røkt av hýruvognum og seinni bussunum.

Bilstøðin BIL var alt og eitt hjá babba. Her var hann stjóri til fyrst í 90-árunum, tá sjúka gjørdi um seg.

Tá Tórshavnar kommuna byrjaði bussleiðina í 1978, varð gjørt av, at Bil skuldi taka sær av hesum. Eisini varð gjørt av, at Bil skuldi taka sær av Bygdaleiðum, tá hesar byrjaðu sum skipaðar í 1980. Tá hevði Bil røkt rutuflutning við hýruvognum nógv ár frammanundan, tó við hýruvognum og smærri bussi, og eisini hevði Bil bátin Rombus um hond.

P/f Postflutningur varð eisini felag, ið babba átti saman við Eivindi Christiansen, og tók hetta felag sær av post- og farmaflutningi til Eysturoy, Norðstreymoy, Vágar og sjálvandi flogvøllin.

Felags fyri hesar fyritøkur er, at vit synirnir altíð vóru tiknir við, tá okkurt skuldi gerast, og seinni vóru vit bilførarar hjá babba og teimum, ið varðaðu av fyritøkunum.

Av frítíðarítrivum hevði babba mest seyð á ungum árum, og so sjálvandi Gandhi, ið var seksæringur, ið Bil læt smíða hjá bátasmiðinum Óla Olsen í Skopun.

Mangur góður túrur er gjørdur við bátinum, men tó eru eisini løtur, vit minnast við sorgblídni, millum annað tá báturin kom inn við einum av eigarunum, ið brádliga var fallin um og seinni doyði.

Minnist, at babba segði frá, at Óli hevði ilt við at lata teir fáa henda bát, tí hann var einki við uppá at byggja bát til bilførarar.

Babba fall ikki í fátt, hóast sjúka nívdi hann tey síðstu árini. Hann var altíð fúsur at rætta eina hjálpandi hond, tá ástóð, og ikki minst strálaði hann, tá vit børnini ella abbabørnini komu á gátt.

Hann hevði familjuna um seg í Áargeil, har eisini hann átti onkran góðan vinin.

Eisini vinfólk aðrar staðir frá komu at vitja, nú hann mestsum var heimasitandi, og tað vilja vit saman við mammu takka tykkum fyri, tí uttan tykkum vóru løturnar langar.

Góði babba, takk fyri lívið, tú gavst okkum og okkara. Vit gleðast um, at tú nú ert har sorg og sjúka ikki gera sítt galdandi.

**Synir tínir við familjum**



# Ungir havnardreingir í 1967

*Í sambandi við at Birgar Johannessen leitar fram gamlar havnarmyndir, kemur hann ofta fram á nógvar aðrar góðar myndir, sum t.d. hendan av fimm ungum havnardreingjum, sum eru avmyndaðir hjá Bambus Foto í 1967.*
*Aftara rað f.v.: Leivur Mortensen, Finnur Helmsdal og Kári Poulsen.*
*Fremra rað f.v.: Ólavur Rubeksen og Eirikkur Rasmussen.*
*Allir búgva teir í Havn uttan Leivur Mortensen, sum býr í Danmark*

*Mynd: Føroya Fornminnisssavn*

## Brúdleyp

Mikudagin 11. mai, *giftust* Jónfríð Lassen, Klaksvík og Súni Hansen, Norðragøta.

Í dag, 14. mai giftast í Prestagarðinum í Fuglafirði Anna Margretha Sølvádóttir úr Leirvík og John Eriksen frá Svendborg. Vælkomst verður í Pálsstovu kl. 19.30.

Í dag, 14. mai kl. 15.00 giftast í Frelsunarherinum í Vági, Emy Margretha Kjærbæk, Vágur og Jens Knudsen,Vágur. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Øravík. Opið hús verður í Frelsunarherinum í Vági frá kl. 21.30.

## Prógv

Tann 28. apríl 2005 hevur Torstein Vestergaard, Froðba, lokið prógv sum Civilingeniør frá Danmarks Tekniske Universitet í Lyngby.

Súsanna Holm, Kvívík, fekk 2. mai 2005 prógv sum cand.mag. í idesøgu (hugmyndasøgu) frá Aarhus Universitet.

## 80 ár

Í dag, 14. mai verður Mimi Hansen, Fuglafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum, hjá Annu og Jógvan Martin, á Fjalsvegi 1, Fuglafjørður.